Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Erling Eidesgaard, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Tunnilstoymið

Spurningar:

1. Hvat hevur Dalstunnilin, ið tunnilstoymið hevur staðið fyri at bora, samlað, t.e. íroknað eitt nú verkætlanarleiðslu, amboðs- og fíggjarkostnað, kostað fyri hvønn metur, áðrenn veg og installatiónir? T.e. fyri tað ráa holið, arbeiðstryggjað við boltum og sproytubetongi?

2. Hvat hava, til samanberingar, tunlarnir Norður um Fjall, ið vórðu útbodnir í fríari arbeiðstøku, og eru boraðir í umleið sama tíðarskeiði, samlað kostað fyri hvønn metur av ráum holi, arbeiðstryggjað við boltum og sproytubetongi?

3. Um endamálið við tunnilstoyminum er at strekkja arbeiðið og harvið útreiðslurnar av smærri tunlum yvir fleiri fíggjarlógir, ætlar landsstýrismaðurin so at kanna, um tað ber til at bjóða arbeiðið út, har slíkur fíggingarleistur er ein fortreyt í útboðnum?

Viðmerkingar:
Í tíðindaskrivi um ársskiftið rør Vinnuhúsið fram undir, at tunnilstoymið borar dýrari tunlar, enn um tunlarnir verða bodnir út í fríari arbeiðstøku.

Er tað veruliga so, sum Vinnuhúsið heldur uppá, so høvdu vit sostatt kunnað borað hesar smærru tunlar fyri lægri kostnað. Vit høvdu altso fingið fleiri metrar fyri somu pengar.

Ætlanin er, at tunnilstoymið í næstum skal fara undir at bora Tjørnuvíkartunnilin. Tí er umráðandi at vita, um hetta veruliga er tann fíggjarliga skilabesti leisturin.

Tí verður spurt.

Á Løgtingi, 10. september 2024

Erling Eidesgaard